UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Dagfesting: 29. sep. 2025
Mál nr.: 25/24822-2
Málsviðgjørt: ARØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 48. frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 51 frá 12. mai 2015, løgtingslóg nr. 108 frá 10. oktober 2023 og løgtingslóg nr. 40 frá 25. mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 78. Vinnusjúkugrunnurin hevur sum endamál at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur sbrt. § 10. *Stk. 2-9.*	**1.** Í § 78, stk. 1, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Vinnusjúkugrunnurin virkar somuleiðis fyri upplýsing um vinnusjúkur og fyribyrging av vinnusjúkum"
§ 78. ...	**2.** Í § 78, stk. 4, verða 2. og 3. pkt. orðað soleiðis:

Stk. 2-3. ... *Stk. 4*. Inntøkur grunsins eru gjøld frá arbeiðsgevarum og sjálvstøðugt vinnurekandi sbr. § 79, og sum verða játtaðar grunninum á árligu fíggjarløgtingslógunum. Inntøkur grunsins skulu nýtast til veitingar fyri skaðar, sum eru hendir í árinum, útreiðslur til umsiting. heruppií kostnaði til Vanlukkutryggingarráðið og til avsetingar til tiltakspeningin. *Stk. 5-9*.	"Inntøkur grunsins skulu nýtast til endurgjald fyri vinnusjúkur, sum eru fráboðaðar í árinum, útreiðslur til umsiting, heruppií kostnað til Vanlukkutryggingarráðið, virksemi, sum hevur til endamáls at upplýsa um og fyribyrgja vinnusjúkum, og til avsetingar til tiltakspeningin."
§ 79. … *Stk. 2*. Gjaldið, sum arbeiðsgevarar skulu rinda, er 0,10% av útgoldnum A-inntøkum. *Stk. 3.* Galdið, sum sjálvstøðugt vinnurekandi skulu rindað, er 0,10% av skattskyldugu inntøkuni hjá sjálvstøðugt vinnurekandi sbrt. skattalógini fyri seinasta inntøkuár. *Stk. 4-5*. ...	**3.** Í § 79, stk. 2 og 3, verður "0,10%" broytt til: "0,05%".